
Stjórin í norska reiðarafelagnum, Sturla Henriksen.

# Óttast at fleiri norsk skip flagga út

**Jógvan Hugo Gardar**

22.03.2015 - 03:18

Oljan.fo

Norska reiðarafelagið hevur spurt limir sínar um hvussu tey meta at gongdin kemur at vera í vinnuni. Felagið hevur havt aðalfund hesa vikuna, og í hesum sambandinum varð ein fragreiðing um støðuna í vinnuni løgd fram.

Við norska fíggjarmálaráðharranum, Siv Jensen, sum sjónarvátti, vístu reiðararnir á, at um ikki broytingar koma í, so fara fleiri reiðarí innan flestu økir at umhugsa at flagga út og at skifta verandi norsku og norðurlendskumanningarnar út við bíligari manningar úr øðrum londum. Serliga bleiv víst til støðuna innan oljuvinnuna, og gongdina síðani oljuprísurin fór at lækka í heyst.

- Vit síggja eina dapra mynd, og hon vísir at fleiri umhugsa at skifta norskar yvirmenn og dekkarar út við útlendskar manningar, fyri at fáa kostnaðin til raksturin at minka. Vit bera

ótta fyri hesi støðuni, segði stjórin í reiðarafelagnum, Sturla Henriksen, til fíggjarmálaráðharran og aðalfundin.

